# Bjørn fór uttan um serkunnleikan

*Torbjørn Jacobsen vil hava at vita, hvørt landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum av órøttum uttan um lógarásetta serkunnleikan, tá broytingaruppskot til lógina um vinnuligan fiskiskap varð gjørt*



**Torbjørn Jacobsen vil hava at vita, hví Bjørn Kalsø ikki gjørdi nýtslu av serkunnleikanum, tá tilmæli um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap vórðu gjørd**

FYRISPURNINGUR
*Jákup Mørk*

Á tingfundinum hósdagin setir Torbjørn Jacobsen tríggjar munnligar fyrispurningar til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø.

Fyrst av øllum vil Torbjørn Jacobsen hava at vita, hvussu handfaringin av broytingunum í lógini um vinnuligan fiskiskap hevur verið.

Víst verður í fyrispurninginum á, at hóast Fiskirannsóknarstovan er stovnur undir Fiskimálaráðnum, so vórðu fiskifrøðingar als ikki við á fundinum, tá uppskot um broytingar var fyri í vinnunevndini.

### Uttan um fiskivinnuráðið

Sum næsta punktið í fyrispurninginum sigur spyr Torbjørn Jacobsen, hví landsstýrismaðurin ikki hevur lagt løgtingsmálið fyri fiskivinnuráðið til ummælis.

Samstundis verður staðfest, at sambært løgtingslóg, so skal fiskivinnuráðið ráðgeva landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, eins og øll týðandi uppskot til lógir og kunngerðir skulu ummælast av ráðnum.

Í viðmerkingunum sigur Torbjørn Jacobsen, at hann heldur tað vera undrunarvert, at landsstýrismaðurin ikki hevur gjørt nýtslu av serkunnleikanum, sum hann hevur atgongd til.

- Kanska hevur landsstýrismaðurin ikki hildið tað hava týðning fyri málsviðgerðina, men nú uppskotið hjá landsstýrismanninum í stóran mun er skotið niður, hann sjálvur er politiskt bakbitin, av síni egnu samgongu, enntá av sínum egnu floksfeløgum, hevði tað kanska verið rættari, um hann hevði havt dubbað seg meira, í hvussu er við omanfyrinevndu amboðum, sum liggja við hendur hansara búgvin at brúka.

Og í triðja lagið til Torbjørn Jacobsen hava at vita, hvør tað er, sum í løtuni mannar Fiskivinnuráðið.

## Royndarveiða á stongdari leið

**Torbjørn Jacobsen vil eisini hava Bjørn Kalsø at svara spurningum um royndar- og gágguveiðu**

FYRISPURNINGAR
*Jákup Mørk*

Torbjørn Jacobsen hevur eisini tveir aðrar fyrispurningar til landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Tjóðveldistingmaðurin sigur seg hava skilt, at landsstýrismaðurin fyri kortum hevur latið loyvi um royndarveiðu til ein bát í bólki 4. Hetta hóast talan var um veiðu á stongdari leið.

Um svarið er játtandi, vil Torbjørn Jacobsen hava at vita, hvørjar grundgevingarnar fyri hesum eru, og hvørjar treytir fylgja við í hesum, eins og spurt verður um, hvørt málið hevur verið fyri á landsstýrisfundi.

Eisini hevur Tobbi ein fyrispurning um gágguveiðu á føroyskum sjóøki. Tingmaðurin vísir á, at teksturin í kunningarskrivinum, sum Fiskimálaráðið hevur sent út, er óvanliga knortlutur, og tí vil hann hava at vita, hvussu hesin skal skiljast.

## Stuðulin til rækjuvinnuna tænti ikki endamálinum

**Bill Justinsussen heldur ikki, at stuðulin til rækjuvinnuna hevur tænt sínum endamálið, tí tá hesin mánaðurin er farin, er bert eitt rækjuskip eftir í vinnu. Hann fer tí at seta landsstýrismanninum spurningar í hesum sambandi**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á tingfundinum seinnapartin í dag fer Bill Justinussen at seta Bjørn Kalsø, landsstýrismanni tríggjar munligar fyrispurningar um rækjuvinnuna. Hann spyr, um landsstýrismaðurin hevur gjørt kunngerðirnar og leiðreglurnar, sum áseta, hvussu rækjustuðulin verður útgoldin. Hann vil eisini hava at vita, av hvørji konto á fíggjarlógini stuðulin er játtaður - og um peningur er tøkur. Eisini spyr hann, hvussu nógvur peningur higartil er játtaður, og hvussu nógvan pening, landsstýrismaðurin væntar at játta í hesum árinum.

Bill Justinssen sigur, at í vár samtykti løgtingið eftir mikið kjak at veita rækjuvinnuni rakstrarstuðul svarandi til tvær milliónir krónur um árið til hvørt av skipunum í tvey ár. Hann vísir á, at støðan í rækjuvinnuni nú er so vánalig, at tá august-mánaði er farin afturum, eru bert tvey skip eftir í vinnu.

_ Og tað liggur á ljóði, at annað av teimum eisini væntast at halda uppat eftir loknan túr. Tá verður so bert eitt skip eftir í rækjuvinnuni. Sostatt tykist ikki, sum stuðulin til rækjuvinnuna hevur tænt sínum endamáli, sigur Bill Justinussen.

## Finningarløn til tey sum slatra um pusharar

**_ Landsstýrið eigur beinanvegin at viðgera, um eitt nú finningarløn skal latast teimum, sum geva týðandi upplýsingar um tey, sum selja hesa skræpuna, er eitt av uppskotinum hjá Bill Justinussen til tess at fáa fatur á teimum, sum eitt nú selja ecstasy til ungdómin**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Bill Justinussen vil seta serliga tiltøk í verk til tess at steðga teimum, ið lata ungdóminum turvelvandi drøgg*

– Hevur landsstýrið viðgjørt álvarsligu støðuna, mong ung koma í, orsakað av vaksandi misnýtsluni av hørðum rúsevnum so sum ecstasy?

– Hvørji ítøkilig fyribyrgingartiltøk ætlar landsstýrismaðurin at seta í verk fyri at koma vaksandi misnýtsluni til lívs??

– Hvat ger fyribyrgingarráðið við trupulleikan?

– Er landsstýrismaðurin sinnaður at fremja ikki síðbundnar atgerðir fyri at fyribyrgja, at alt fleiri sakleys ung fáa mein fyri lívið av umtalaðu rúsevnunum?

Hesar spurningar fer Bill Justinussen í dag at seta Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum. Hann vísir til ein stubba í Dimmalætting fyrr í vikuni, har løgreglan m. a. sigur:

*Rákið er, at fleiri og fleiri taka ecstasy, tað er lættari at handfara enn hassj og luktar ikki á sama hátt, sigur narko løgreglan. Tað eru serliga tey ungu, sum hava tikið hetta rúsevni til sín. Tað er vandamikið, tí tú veit ongantíð hvussu styrkin í eini tablett er, leggur løgreglan dent á.*

_ Trupulleikin við vaksandi útboðnum av hørðum rúsevnum - serliga ecstasy - er sera álvarsamur, tí vandin er stórur fyri, at sakleys ung fáa mein fyri lívið orsakað av misnýtsluni. Ongantíð ov skjótt eiga landsins myndugleikar at taka stór stig fyri at fyribyrgja hesi hóttandi gongd, heldur Bill Justinussen.

Hann sigur, at neyðugt er at hugsa nýtt, og neyðugt er at hugsa skjótt.

_ Nýggj miðvís og væl fyriskipað fyribyrgingarátøk eiga at koma eitt fyri og annað eftir, inntil vunnið er á tramanskapinum. Ongin av okkum politikarum ynskir, at dóttir ella sonur okkara skulu enda í klørnum á einum av hesum eirindaleysu sjálvsøknu egoistum, sum uttan himpr seta lívið hjá øðrum í váða fyri egnan vinnings skuld. Tí eiga vit at ganga í fremstu røð at steðga gongdini, heldur hann.

Bill Justinussen sigur, at landsstýrið eigur at brúka øll vápn í stríðnum. Eitt nú eigur landsstýrið beinanvegin at viðgera, um eitt nú finningarløn skal latast teimum, sum geva týðandi upplýsingar um tey, sum selja hesa skræpuna. Eisini eigur alt, sum stendur í føroyskari myndugleika makt at gerast fyri at geva harða revsing til teirra, sum selja. Danska løgreglan eigur at fáa sterka áheitan frá landsstýrinum um at senda meiri fólk út á gøturnar og hagar, sum ung í stórum tali savnast.